## ... um enskan fótbólt

Mær dámar sera væl enskan fótbólt, eg haldi við Manchester United, og tað gongur jú heilt væl fyri tíðina.



## ... um nýggja FSF-forsetan

Mær dámar hann væl sum persón. Eg trúgvi veruliga uppá, at hann fer at gera eitt gott arbeiðið fyri føroyskan fótbólt. Høgni er væl skikkaður til starvið



- Eg gleði meg til at kunna sleppa at brúka alt fokus, og alla orku uppá eitt lið

HB – og sum áður hevði leikt við ÍF – bað hana koma at leika við 1. deild kvinnum hjá HB, tí tær manglaðu ein málverja. Annika tók av tilboðnum, og sigast má, at tað gekk optimalt, HB-kvinnurnar gjørdust Føroyameistarar fyrsta árið hon vardi málið. Annika vardi málið á besta kvinnuliðnum hjá HB fram til 2001, og tók hon sína uppgávu so seriøst, at hon bað um at sleppa við til tær serligu málverju-venjingarnar, sum Pætur Clementsen hevði fyri Kaj Leo Johannesen, Bárði Johannesen og unglingamálverjunum. - Eg haldi tað er týdningarmikið, at ein ger vart við seg. Tí ein skal ikki vænta, at mennirnir bara biðja ein koma við til servenjingar og tekniskar venjingar. -

### Saknur í kvinnunum

Hesumegin aldarskiftið fekk kvinnufótbólturin hjá HB eitt heldur myrkt tíðarskeið uttan eitt kvinnulið. Annika undirstrikar, at umstøðurnar heldur ikki vóru við HB. Ein heilur árgangur í Gentum 14-17 datt burtur, fleiri fóru niður at lesa, og onkur gavst at spæla. Talan gjørdist um 8 spælarar, sum antin fluttu av landinum, ella góvust. - Hesi árini merktust í HB. Eg haldi tað var eitt negativt upplivilsi fyri felagið, men eg haldi, at nevndin arbeiddi hart fyri at fáa okkum úr hesi naggatódnini. Frá felagsins síðu var roynt at seta útbúnar venjarar og vaksnar venjarar til yngru deildirnar, og tað hjálpti. Áðrenn var tað ov tilvildarligt, at 14-15 ára gamlar gentur vandu yngru liðini. Nú roynir ein heldur at hava 16-17 ára gamlar, sum hjálparvenjarar. - Í fjør vóru tað stórt sæð tær sum mannaðu Gentur 14-17, sum eisini mannaðu 2. deildarliðið, men í ár hevur 2. deildarliðið fingið størri tilgongd av vaksnum leikarum. Annika heldur tað er í ordan at hava núverandi skipan við 6 liðum í 1. Deild, og 6 liðum í 2. Deild, og at KÍ og B36 verða seedaði í Steypakappingini. - Tað er týdningarmikið, at allir dystirnir hava eitt ítróttarligt virðið. So leingi vit hava nøkur krútsterk lið í kvinnufótbólti er í lagið, at vit hava nøkur seedaði lið. Dystir sum enda 13-0 ella 7-0 hava einki ítróttarligt virðið. -

### Heldur EM enn Oyggjaleikir

Tá tað kemur til kvinnulandsliðs-fótbólt er Annika heilt avgjørd: - Tað er betri og rættari, at vit eru við í EM-undankappingum enn, at vit eru við á Oyggjaleikunum. -

Annika var við til at vinna Oyggjaleika-gull fyri Føroyar í 2001. "Tað var bara ein dystur av fimm, sum hevði ítróttarligt virðið, og tað var finalan ímóti Álandi, sum vit vunnu 5-4 við tógvið stríðið. Hinir dystirnir vóru allir eitt antiklimaks, har ein møtti 100% fokuseraður til dyst, men endaði við at vinna tveysiffrað. Tá vit so skuldi spæla fimta dystin, sum var finalan, tá vóru vit komnar væl niður í gear, og máttu hála okkum í gongd aftur." Annika metir, at tað hevur alstóran týdning fyri ungu kvinnuligu leikarnar, at tær hava bæði eitt U-17 og eitt U-19 landslið at stremba eftir. - Hondbólturin egnir nógv við uttanlandstúrum, sum mennir ungu leikarnar. Tað er týdningarmikið, at vit eru líka árvakin innan fótbóltin. -

### Fangast tíðliga

Annika heldur, at skulu hini feløgini bjóða KÍ av, so er týdningarmikið, at hini feløgini hava nóg mikið av tilfeingi, og at ringir árgangir ikki koma fyri. Góðir venjarar, sum menna leikarnar tekniskt og taktiskt eru eisini av alstórum týdningi. Har hava m.a. tvíburðarnir hjá KÍ, Rannvá og Ragna gjørt eitt sera gott arbeiðið fyri Gentur 14-17. Sama kann sigast um venjaran hjá Gentum 14-17 á Skála, Andrass Danielsen, sum hevur fylgt gentunum allan vegin upp gjøgnum deildirnar, og tí hava tær eitt gott lið. Annika heldur, at framtíðin boðar frá góðum, tí nú eru nógvar gentur, sum byrja at leika fótbólt, sum 7-8 ára gamlar. - Tað er týdningarmikið, at ein fangar tær, tá tær eru ungar. Og at ein lærir tær at hugsa, sum fótbóltsleikarar á ungum árum. - Spurd um leisturin, sum summi av grannalondunum brúka, at gentur og dreingir eru á liði saman til 11-12 ára aldur er ein gongd leið fyri Føroyar? Har svarar Annika, at tað hevði kanska verið vert at fingið á breddan. Hon nevnir Kristinu Eyðbjørnsdóttir úr Leirvík, sum spældi við javnaldrunum á dreingjaliðunum, og Haldóra Joensen, sum vandi við monnunum hjá Royn, sum tvey góð dømi um, at tað átti at borið til. Sjálv fer hon at venja pinkurnar hjá HB burturav í ár. - Í fjør vandi eg lið hvønn dag í vikuni, eg gleði meg til at kunna sleppa at brúka alt fokus, og alla orku uppá eitt lið. Tí tað er ein avgjørdur fyrimunur. - Endar ein avgjørd Annika Hansen, eina góða fjórðingsøld eftir, at javnstøða kom millum kynini á fótbóltsøkinum.